

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 12 - 2011

# Oljuvinnan ávarar ímóti ovurhiting

At oljufeløg hava funnið fleiri og eisini stórar keldur á norska landgrunninum í seinastuni hevur elvt til rættiliga stórt bjartskygni, men nú ávarar vinnan sjálv ímóti at yvirhita marknaðin. Norska hagstovan hevur roknað seg fram til, at íløgurnar í olju- og gassvinnuni verða 184,6 milliardir norskar krónur í 2012. Tað er knappar 34 milliardir meiri enn metingin fyri árið í ár. Orsøkin til vøksturin er sambært Stavanger Aftenblad tann góði oljuprísurin og tær nógvu leiðirnar í norskum sjógvi, sum eru í drift. -Vit mugu finna eina javnvág millum avgerðirnar at útbyggja nýggjar leiðir og at taka úr verandi leiðum, og hetta hevur skund, sigur Kjell Pedersen, sum er stjóri í Petoro. Í ár eru meiri enn 50 leitibrunnar boraðir á norskum øki, og talið verður á leið tað sama í 2012, samstundis sum stórt virksemi er á verandi leiðum. Tí er okkurt, sum bendir á, at vinnan má leita sær av landinum fyri at fáa nýggjar uppgávur, sigur tilfeingisstjórin í Oljustýrinum, Johannes Kjøde, við Aftenbladet.